# Løgið at Jóannes følir seg útihýstan

**– Eg skilji ikki, hví javnaðarflokkurin følir seg útihýstan úr samgonguni, tí orsøkin er eina og aleina politisk, sigur Høgni Hoydal**

*– Orsøkin til, at javnaðarflokkurin ikki er við í samgonguni, er tí, at hann heldur vildi hava eina samgongu við fólkaflokkin og sambandsflokkin. Tá ið tað miseydnaðist, kom hann at standa uttanfyri, sigur Høgni Hoydal*

NýGGJ SAMGONGA
*Áki Bertholdsen*



– Eg skilji ikki, hví Jóannes Eidesgaard følir, at javnaðarflokkurin er útihýstur frá at koma í samgongu. Hann hevði avgjørt møguleikan, men gjørdi at at ganga aðrar leiðir.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins heldur ikki, at formaður javnaðarfloksins hevur grein í sínum máli, tá ið hann sigur, at javnaðarflokkurim miðvíst varð skumpaður út í andstøðumyrkið, nú samráðst hevur verið um nýggja samgongu í ein mánað.

Jóannes Eidesgaard segði við Sosialin í fyrradagin, at tað kundi ikki vera av politiskum orsøkum, at javnaðarflokkurin ikki er við í hesi nýggju samgonguni, tí samgonguskjalinum kann flokkurin fyri ein stóran part taka undir við.

Tá ið samgongusamráðingarnar ímillum fólkaflokkin, javnaðarflokkin, sjálvstýrisflokkin og tjóðveldisflokkin slitnaðu, harmaðist Høgni Hoydal. Men samstundis vísti hann á, at orsøkin var, at javnaðarflokkurin at kalla ongi stig varð sinnaður at taka á fullveldisleið og tí slitnaðu samráðingarnar, hóast tjóðveldisflokkurin hevði strekt seg so langt sum yvirhøvur gjørligt.

Nú samgonga er skipað ímillum fólkaflokkin, sjálvstýrisflokkin, tjóðveldisflokkin og miðflokkin, staðfesti Jóannes Eidesgaard, at onki er lagt afturat á fullveldisøkinum hjá samgonguni, sum javnaðarflokkurin ikki kundi taka undir við.

– Tað er áhugavert at staðfesta, at tær forðingar sum lógu í vegin fyri eini samgongu við javnaðarflokkin, ikki longur liggja í vegin fyri eini samgongu við miðflokkin, segði Jóannes Eidesgaard.

## Skilir onki

Hesin skilir formaður tjóðveldisfloksins púrt onki av.

Høgni Hoydal sigur, at Jóannes Eidesgaard veit fullvæl, at hjá tjóðveldisflokkinum er als onki til hindurs fyri at samstarva við javnaðarflokkin.

Hann sigur, at orsøkin til, at onki spurdust burturúr samráðingunum við javnaðarflokkin var bara politiskt og onki annað.

– Hvat annað skuldi tað verið?, spyr hann.

Hann sigur, at orsøkin til, at samráðingarnar við javnaðarflokkin slitnaðu, var, at tað bar als ikki til at koma nakran sum helst veg longur fram á sjálvstýrisleið.

–Tjóðveldisflokkurin toygdi seg so langt, sum hann yvirhøvur kundi og eg eri framvegis rættiliga skelkaður av, at javnaðarflokkurin ikki vildi taka undir við tí sjálvstýrisflokki, sum lá á borðinum, tí tað hevði eg avgjørt væntað.

Høgni Hoydal sigur eisini, at síðani fóru samráðingar ígongd ímillum fólkaflokkin, sambandsflokkin og javnaðarflokkin og tá var tað tjóðveldisflokkurin, sum varð útihýstur.

–Eg havi varhugan av, at tað var eitt sterkt ynski um hesa A,B,C samgonguna, sum førdi til, at samráðingarnar ímillum fólkaflokkin, javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin, slitnaðu. Eg haldi, at størsta forðingin fyri, at javnaðarflokkurin er við í hesi samgonguni, er, at hann hevði eitt sterkt ynski um eina samgongu við sambandsflokkin og fólkaflokkin, men tær samráðingarnar slitnaðu so eisini og tí var farið víðari til miðflokkin.

Jóannes Eidesgaard sigur, at á ríkisrættarliga økinum liggur samgonguskjalið innanfyri tað, sum javnaðarflokkurin kundi góðtikið?

– Tað gjørdi tað so ikki, tá ið vit samráddust, tí tá kundi javnaðarflokkurin ikki taka undir við sjálvstýrismálinum.

Hann sigur, at m.a. kundi javnaðarflokkurin ikki undir nøkrum umstøðum góðtaka, at arbeiðið, at yvirtaka løgreglu og rættarmál, skuldi halda fram, hóast tað longu er byrjað og tí skiltist partarnir.

– Men í samgonguskjalinum, sum nú er skrivað, stendur, at tað arbeiðið skuldi halda fram.

Formaður tjóðveldisfloksins fegnast um, at javnaðarflokkurin kortini kann taka undir við fullveldispolitikkinum.

–Sigur hann tað, nú samgongan er skipað, hevur hann flutt seg og so er tað bert at fegnast um. Men so er eftir at vísa tað í verki. Tó eri eg ógvuliga harmur um, at hann ikki flutti seg so frægt, tá ið samráðingarnar vóru, heldur enn at siga tað aftaná.

Hann vísir eisini á, at tá ið farna valskeið byrjaði, segði javnaðarflokkurin eisini, at hann kundi taka undir við fullveldismálinum, men tíðin kom at prógvað tað beint øvugta.

Hann leggur afturat ætlanin er framvegis at skipað eitt breitt samstarv í løgtinginum, men so fer tíðin at vísa, um javnaðarflokkurin meinar nakað við, at hann tekur undir við politikkinum, ella um tað einaferð afturat endar sum seinasta valskeið.

Høgni Hoydal:

# Kósin ímóti fullveldinum verður hildin

**–Við hesi nýggju samgonguni hava framvegis beina kós fram ímóti einum sjálvstøðugum Føroyum, sigur Høgni Hoydal**

NýGGJ SAMGONGA
*Áki Bertholdsen*

– Eg veit væl, at mong siga, at hetta nýggja samgonguskjalið ikki er so víðgongt sum tað seinasta. Men endamálið er enn tað sama.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins sigur, at tað er als ikki rætt, tá ið politikarar úr andstøðuni tvíhalda um, at hendan nýggja samgongan hevur slept ætlanini um fullveldið.

–Tað er ikki rætt. Akkurát sum í seinastu samgongu, hevur hendan samgongan sett beina kós fram ímóti fullveldinum, tí allir flokkarnir í samgonnguni taka undir við, at Føroyar fáa sjálvræði.

Men hann váttar tó, at ferðin er sett nakað niður við tað, at samgongan hevur avtalað, at blokkurin einans læsast fastur, ístaðin at minka, tvs, at hann skal ikki hækka.

Higartil hevur hann ikki viljað sagt so nógv um sjálvt samgonguskjalið.

Men nú sigur hann, at sostatt byggir hetta samgonguskjalið sjálvstýrissamtyktina, við tí undantaki, at blokkurin ikki verður minkaður. Annars eru allar yvirrtøkur við.

Hann vísir eisini á, at búskaparpolitikkurin bendir á sama borðið, tí eisini á tí økinum verður kósin fram ímóti fullveldinum hildin.

– Eftir samgonguskjalinum skulu vit nevniliga alsamt gera okkum leysari av blokkstuðlinum við tað, at yvirskotið á fíggjarlógini ska l alsamt veksa.

Harumframt er full semja um, at tað er neyðugt at lækka skattin hjá lág- og miðalinntøkum og hjá húskum við børnum.

–Samstundis er ætlanin at økja munandi um vælferðartænasturnar, bæði á eldraøkinum og almanna- og heilsuøkinum sum heild.

Men orðið fullveldið verður ikki nevnt í samgonguskjalinum?

– Jú, tað verður tað! Tað stendur, at vit hava fullan sjálvsavgerðarrætt. Tað stendur eisini, at øll málsøki skulu yvirtakast, uttan tey, sum hava samband við suverenitetin. Suverenitetur er tað sama sum fullveldið. Sostatt er samgonguskjalið í fullum samsvari við sjálvstýrissamtyktina, sigur Høgni Hoydal.



*Í nýggja samgonguskjalinum er orðið »fullveldið« skift út við »suverenitet«, sum merkir tað sama. hendan samgongan er fult í samsvari við sjálvstýrissamtyktini, heldur Høgni Hoydal*

## Fult forsvarligt

Jóannes Eidesgaard helt í Sosialinum í gjár, at samgonguskjalið var mótstriðandi so tað munar, tí øðrumegin verður inntøkurnar lækkaðar og honvegin er ætlanin at økja útreiðslurnar munandi.

Hesum er Høgni Hoydal als ikki samdur i.

Í fyrstu atløgu heldur hann ikki, at tað er sjálvsagt, at inntøkurnar lækka fyri tað, um skatturin hjás lág og miðalinntøkum lækkar og blokkurin verður frystur fastur.

– Í øðrum lagi er ætlanin at gera neyvar útbyggingarætlanir so at vit ikki byggja okkum yvir rygg og kollsigla búskapin.

–Men sjálvsagt er tað avgerðandi, at tað framvegis er búskaparlig framgongd í landinum. Hesi seinastu árini hevur búskaparligi vøksturin verður ovurstórur. Verður hann bara helvtina so stóru tey komandu árini, er avgjørt rúmd fyri teimum ytbyggingum, vit hava sett okkum fyri.

Høgni Hoydal sigur, at Búskaparráðið er dúgliga spurt til ráðs, tá ið búskaparpolitikkurin komandi árini varð avtalaður.



# Broytt manning á Shell Quick Service



*Fríggjadagin fór Shell Quick Service í Klaksvík undir nýggjar hendur*

*Mynd Símun á Høvdanum*

**Jan Joensen og Sven Dahl hava nú yvirtikið virksemið hjá Shell Quick Service í Klaksvík, eftir at Dávur Joensen er givin við hesum.**

VERKSTAÐ
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Dávur Joensen hevur síðan 1985 rikið virksemið hjá Shell-støðini í Klaksvík, men fríggjadagin handaði hann verkstaðið hjá sær yvir á aðrar hendir.

Sáttmálin, sum Dávur Joensen hevði við Føroya Shell um at reka virksemið teirra her í býnum, er nú eisini farin í søguna, og hevur Føroya Shell samstundis keypt sølubúðina, soleiðis at teir nú sjálvir fara at reka støðina.

Fyrr í ár segði Dávur Joensen við Sosialin, at hann helt, at tíðin nú var komin til at gevast.

- Eg havi altíð sagt, at eg skal gevast við at arbeiða, áðrenn eg verði seksti. Nú verði eg 58, so tíðin er komin til at gevast, segði Dávur tá við Sosialin.

Og fríggjadagin í seinastu viku gavst hann sostatt við virkseminum á Shellstøðini, og lat verkstaðið í nýggjar hendir.

## Eingin broyting

Jan Joensen hevur tikið yvir tann eina partin av verkstaðnum, meðan Sven Dahl hevur yvirtikið hin partin.

Sven kemur at taka sær av lakeringum og skaðum, meðan Jan tekur sær av tí mekaniska arbeiðinum, so sum at skifta olju, dekk og annað.

Hóast tveir leiðarar nú eru á verkstaðnum, so koma bæði verkstøðini at samstarva um umvælingar av ymsum slag.

– Vit leggja okkum sjálvandi eftir einum góðum samstarvi, soleiðis at kundin ikki nýtist at skilja okkum sum tvey sjálvstøðug verkstøð, greiðir Jan Joensen frá.

Sven Dahl hevur í fleiri ár starvast undir Dávur Joensen, men verður hann nú at meta sum leigari av verkstaðnum. Samstundis hevur verkstaðið eisini fingið nýtt navn, og eitur nú S.D.- lakering.

Jan Joensen hevur í fleiri ár havt egið bilverkstað, og hevur sostatt fleiri royndir innan hetta økið.

Í eini 10 ár átti hann egið bilverkstað, sum tók sær av lakeringum av bilum, men herfyri seldi hann hetta verkstað. Ístaðin fór hann undir at selja bilar og dekk, og hevði ætlanir um at byggja eitt nýtt høli, har hann kundi skipað virksemið sítt.

- Men tað er vónleyst at fáa hendur á nøkrum grundstykki í Klaksvík. Tá eg so sá, at Shell lýsti eftir nýggjum leiðara her í Klaksvík, valdi eg at bjóða meg fram, greiðir Jan Joensen frá.

Fríggjadagin fekk Shell soleiðis tveir nýggjar leigarar í Klaksvík, men sum Sosialurin skilur, verða ikki nakrar stórvegis broytingar á skránni.

– Vit koma at reka verkstaðið eftir sama leisti, sum Dávur gjørdi. Lærlingarnir halda eisini fram, og ongar stórvegis broytingar eru í væntu, sigur Jan.

Hann leggur tó afturat, at sjálvur fer hann at leggja seg meir eftir at selja dekk og annað tilhoyr, umframt at verkstaðið nú eisini fer at bjóða bilar til sølu.




Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

ALLAR
ENTREPRENØR MASKINUR…

Alt innan nýtt og brúkt
KOMATSU í Føroyum
sp/f KBI
Postbox 354 · FO-700 Klaksvík · Faroe Islands
Mobile: +298 214406 · Phone: +298 458606 · FAX +298 458706